# Seyðatalið eigur at lækka

*Ein háttur at betra um seyðahaldið í Føroyum er rætt og slætt at taka einar 20.000 áseyðir av, heldur stjórin á Royndarstøðini*

EDVARD JOENSEN

Lække vit áseyðatalið í Føroyum úr 75.000 niður í 55.000, kann úrslitið væl gerast, at vit fá dupult so nógv lomb, sum vit fáa í dag. Hetta heldur Peder Haahr, stjóri á Royndarstøðini í Kollafirði.

Peder Haahr helt fyrilestur á bóndastevnuni, sum varð hildin á Hotel Vágum seinasta vikuskifti. Har nam hann millum annað við, at føroyingar fáa alt ov lítið burtur úr seyðahaldinum. Hann metti millum annað, at kjøtframleiðslan kann vaksa munandi, um vit hugsa øðrvísi, enn vit gera í dag.

Í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin sigur Peder Haahr, at tað er einki revolutionerandi hent innan føroyskt seyðabrúk seinastu hálvu øldina. Til sammetingar vísir hann á, at hjá neytabøndum er mjólkaframleiðslan tvífaldað síðan 1970.

Einasta stórhendingin í seyðarøktini seinastu hálvu øldina er tann, at vit eru sloppin undan teimum fellunum, sum javnan raktu landið. Tað hava vit gjørt við at fóðra eitt sindur um veturin.

### Meira kjøt

Føroyingar mugu leggja seg eftir at fáa meira kjøt burtur úr seyðinum, sigur Peder Haahr, stjóri á Royndarstøðini. Vit hava ikki klárað at lagt seyðahaldið um frá ullaframleiðsluni, sum var álitið í gomlum døgum, til nakað meira lønandi. Og í dag vil eingin síggja ullina. Tað mesta verður beinleiðis blakað burtur.

Peter Haahr vísir á, at útrokningar siga, at við at taka áseyðatalið í Føroyum 20.000 niður, kunnu vit vaksa kjøtsøluna einar 20 milliónir krónur.

Verður sama fóðurnøgd givin til 55.000 seyðir, sum vit í dag brúka til 75.000, verða teir, sum eftir eru, væl betri fyri. Samstundis eiga vit at leggja okkum eftir at betra um slagið og fáa fleiri tvílembur. Alt í alt ber til at fara frá 0,75 lambi pr. ær til 1,5 lamb pr. ær árliga, metir hann.

Men tað krevur ávísar broytingar í tí mynstri, vit síggja í seyðarøkt í dag. Tað ber til dømis ikki til,at bara ein hagi tekur av. Tí so kemur grannaseyðurin bara inn á hagan ístaðin. Neyðugt verður at hegna av, har slíkar broytingar skulu gerast.

Og við teimum mongu føroysku ognarhøgunum er eisini neyðugt við broyting í hagalógini. Lógin, sum er rættiliga gomul, sigur, at ein meriluti av eigarunum skal vera fyri at gera broytingar. Men síðan lógin varð gjørd, er nógv jørð arvað sundur í petti, og tí eru nógvir eigarar til tað, sum kanska bara ein var til, tá lógin varð gjørd.

Møguleiki er tí fyri, at fleiri eigarar í tali, sita við einum lítlum parti av markatalinum og sostatt kunnu forða broytingum, um teir ynskja tað.

### Tøkni má til

Tað er kortini ikki nokk bara at taka niður, hegna av og fóðra betri, heldur Peter Haahr. Hann sigur, at miðvíst kynbótararbeiði skal gerast, skulu vit fáa betri úrslit av seyðahaldinum. Til dømis at skilja tann feita seyðin frá og fáa seyð við meira kjøti enn feitti.

Tað kann gerast við nýggjari tøkni. Seyðurin verður rætt og slætt scannaður, sum gjørt verður við einahvørja barnakonu í dag.

Scannarin verður settur á tað livandi lambið, og funnið verður fram til hvussu nógv feitt, kjøt og so framvegis er á kroppinum. Tað feita verður so tikið frá, og slept verður undan tí, sum er kjøtut. Íslendingar hava á hendan hátt vaksið væl um meðalvektina eftir fáum árum.

Men slík útgerð er sjálvandi ikki nakað, sum hvør maður fer at liggja inni við. Scannarin kostar fleiri hundraðtúsund krónur. So hugsandi kundi verið, at til dømis Royndarstøðin fekk ein, sum so ferðast varð runt við um heystið, heldur Peder Haahr.

Hann sigur, at alt hetta er treytað av, at vit hava neyva skráseting av seyðinum. Eitt sonevnt seyðaeftirlit, eins og vit hava havt neytaeftirlit í fleiri ár. Tað krevur meira arbeiði av teimum, sum eiga seyðin. Bæði merking, telduskráseting og so framvegis. Men úrslitið fer helst eisini at vísa seg, heldur Peder Haahr.



*Starvsmannafelagið hevur biðið Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, um fund, tí felagið heldur, at okkurt er „ravruskandi galið“ Á aðalfundinum hjá Starvsmannafelagnum fanst formaðurin hvassliga at gongdini seinasti tíðina*

# Ov lítið av peningi til eini 80 fulltíðarstørv

*–Endamálið kann vera leggja alment virksemi út til tað privata at skalta og valta við og harvið at syndra tað samhaldsfasta samfelagið*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Vit fara ikki at góðtaka, at tær lønarhækkingar, vit hava samráðst okkum fram til, skulu gerast eitt slag í nakkan á okkum seinni við uppsagnum og privatiseringum sum avleiðing.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum heldur, at tað er okkurt „ravruskandi galið“, við tí førda politikkinum, sum hann sjálvur málber seg.

Tað, sum hann sipar til, er tað, sum er hent, síðani limirnir í Starvsmannafelagnum fingu lønarhækking í fjør. Og hann heldur, at gongdin er so mikið álvarslig, at tað kann ikki fara afturvið borðinum óátalað.

– Vit avtalaðu eina lønarhækking upp á 6,5%. Men nú fíggjarlógin fyri 2000 verður løgd fram, er alt ov lítið sett av til tær avtalaðu lønarhækkingarnar.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at ein grannskoðari hevur roknað út fyri Starvsmannafelagið, at ov lítið er sett av á fíggjarlógini í ár, svarandi til eini 80 fulltíðarstørv.

Á aðalfundinum hjá Starvsmannafelagnum um vikuskiftið, fanst formaðurin hvassliga at hesi mannagongdini hjá landsstýrinum.

–Lønarhækkingarnar er eitt av teimum tølunum, sum vit heilt neyvt kunnu meta um, so tað er heilt ófatiligt, at hetta ikki verður sett á fíggjarlógina og at landsstýrið heldur velur at skapa ótryggleika við møguligum uppsagnum sum avleiðing, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann sigur, at tá ið nýggjar lønaravtalur verða gjørdar, eigur tað at vera heilt sjálvsagt, at tann neyðugi peningurin verður settur av, so at lønarhækkingin kemur pørtunum til góðar.

– Men nú er vend komin í, og tað hevur elvt til ómetaligar trupulleikar, ikki minst, har uppsagnir longu eru settar í verk, eitt nú í heilsuverkinum.

### Tvær orsøkir

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at tað kunnu vera tvær orsøkir til at støðan er blivin, sum hon er.

– Antin er talan um politiskt dugnaloysi ella gáloysni í fíggjarmálastýrinum. Men um so er, átti tað ikki verið ringt at tikið í egnan barm og at rætta mistakið.

– Ella talan um eina miðvísa ætlan, har landsins stýr hevur lagt seg á eina kós, sum hevur til endamáls at syndra tað samhaldsfasta samfelagið og at slúsa samfelagsvirðini yvir til tað privata vinnulívið at umsita.

– Og tað er alt, sum bendir á, at hetta er leiðin, sum ætlanin er at ganga.

Men Gunnleivur Dalsgarð sigur, at í hesum sambandi spælir landsins stýri ikki við opnum kortum, tí er ætlanin at minka almennu umsitingina, og at skerja tað samhaldsfasta samfelagið, skal tað viðgerast saman við Starvsmannafelagnum.

Hann sigur, at upp ígjøgnum nítiárini, tá ið samfelagið rapaði, vóru uppsagnir dagligur kostur.

Men eisini nú verða fólk ferð eftir ferð søgd upp av spariávum, hóast dúgliga verður reypað av, at allir kassar eru so fullir, at tað gongst nóg illa at fáa lokið á.

–Nú tykist sum um sparing er blivin ein góðkend uppsagnargrund. Men tá ið sparingarnar hava tað við sær, at onnur skulu renna skjótari, ella tað, sum verri er, at almennar uppgávur verða lætnar privatum at røkja, er okkurt „ravruskandi galið“, sum ikki kann fara afturvið borðinum.

Hann sipar m.a til at reglurnar í sáttmálanum verða ikki hildnar um, at starvsfólkið skal takast við uppá ráð, tá ið broytingar henda.

– Og tað hendir við vælsignilisi frá landsins myndugleikum.

### Vandi á ferð

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at tað tykist sum um at privatisering og útlisitering eru tvey hugtøk, sum hava rættiliga góðan byrð í løtuni.

– Ikki minst hava vit eitt vinnumálastýrið, sum brúkar at kalla alla sína politisku og umsitingarliga orku til at at draga almennar uppgávur yvir til tað privata

–Fleiri stig eru longu tikin á privatiseringsleiðini. Í fyrsta umfari er tað gjørt undir heitinum almenn partafeløg. Men tað er greitt, at endamálið er ein beinleiðis privatisering.

– Vit halda, at hetta er rætiliga álvarsligt, tí eftir okkara tykki er endamálið við hesum fyrst og fremst at slúsa almennar uppgávur yvir til tað privata, sum so skal røkja tær við tí fyri eyga at vinna pening burturúr.

Gunnleivur Dalsgarð vísir á, at tað ongastaðni verður sagt, hvørjum hesar privatiseringar annars gagna.

– Úr øðrum londum vita vit, at avkastið fer ikki til tænastuna, ella til starvsfólki, men beint í lumman á teimum, sum standa fyri hesum.

– Og dømi eru enntá um, at øki í heilsuverkinum, sum eru privatiserað, verða beinleiðis misrøkt, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

### Hava biðið um fund

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at felagið hevur biðið fíggjarmálaráðharran um fund um hesi viðurskifti, men tað hevur ikki eydnast enn.

– Vit vit eiga longu nú at gera greitt, at hesin spurningurin verður tikin upp, næstu ferð vit fara at samráðast um nýggjan sáttmála, sigur Gunnleivur Dalsgarð.



# Risayvirskot í Føroya Banka

*Fjórða árið á rað hevur Føroya Banki eitt yvirskot, sum er omanfyri 200 mió. krónur. Og eins og undanfarin ár dryppar eisini væl í landskassan hesaferð*

SVEINUR TRÓNDARSON

Føroya Banki almannakunngerð roknskapin í dag og hann vísir eitt yvirskot upp á heilar 218 mió. krónur. Tað er fjórða árið á rað, at yvirskotið hjá Føroya Banka er omanfyri 200 milliónir, og síðani bankarnir vórðu samanlagdir hevur hann havt eitt avlop upp á 1,5 milliardir eftir skatt.

### Stjórin vælnøgdur

Tað er sjálvsagt ein sera vælnøgdur stjóri, sum leggur roknskapin fyri 1999 fram fyri aðalfundin.

– Tað hevur eydnast okkum at reka bankan fyri ein støðugt bíligari penga og tað verður gjørt við einum støðugt minni rentuavlopið, sigur Jørn Astrup Hansen.

Umstøðurnar at reka banka í dag eru munandi øðrvísi enn tær vóru í áttati árunum og tað sæst aftur bæði á inntøkum og útreiðslum bankans.

Rentuinntøkurnar hjá bankanum - tað, sum bankin livir av - eru minkaðar ár undan ári. Tað merktist kanska serliga væl í fjør, tá rentan bankin fekk uttanlands, var lægri enn nakrantíð.

Hinvegin eru útreiðslurnar eisini minkaðar samsvarandi, so samanlagda úrslitið av vanliga rakstrinum er á leið tað sama, sum tað var í 1998.

### Stórar afturføringar

Tað, sum hevur sermerkt roknskapirnar hjá Føroya Banka seinastu árini, eru tær stóru afturføringarnar av áður avsettum skuldarum. Í báðum bankunum vóru avsettar 4 mia. krónur og av teimum eru uml. 3,4 mia. avskrivaðar. Av restini eru nógv inntøkuført í roknskapinum og tað hevur ávirkað roknskapin tann rætta vegin.

Hetta hevur við sær, at eginognin hjá bankanum nú er heilar 1.079 mió. krónur og tað vil í stuttum siga, at bankin er sera væl fyri.

Og hesin peningur er til staðar, tí bankin hevur ein sera góðan likviditet. Samantalt er tøkið peningur bankans meiri enn 1,75 mia. krónur og tað vil í veruleikanum siga, at tað skal eitt sera, sera álvarsligt bakkast til, um bankin skal fara av knóranum.

### Lítil skattur

Hóast stóra avlopið hevur bankin ikki goldið skatt, sum svarar til yvirskotið. Orsøkin til tað er, at bankin, tá avsetingarnar vórðu gjørdar, ikki dróg hann frá í skattligu uppgerðini og tískil ikki skal taka hann við í skattligu uppgerðini nú.

Jørn Astrup Hansen sigur, at tíðin hevur víst, at tann avgerðin var røtt, tí annars hevði skattabyrðan tart nógv upp á tøka peningin hjá bankanum.

Kortini er tað ikki so, at peningurin »bara liggur« í Føroya Banka, tí seinastu árinin hevur bankin goldið knappar 600 mió. krónur til eigaran, sum er Landsstýrið. Eisini í ár fær Landsstýrið ein kekk frá bankanum og í ár ljóðar hann upp á 100 mió. krónur.



*– Tað hevur eydnast okkum at reka bankan fyri ein støðugt bíligari penga, sigur Jørn Astup Hansen. Mynd: Álvur Haraldsen*

### Vinnulívið á rættari kós

Ein av høvuðsorsøkunum til góða úrslitið hjá bankanum er, at vinnulívið er komið á rætta leið. Fiskivinnan stendur seg væl og serliga Fiskavirking, sum hevur ligið sum ein kleppur hjá bankanum, hevur fingið vind í seglini.

– Tað sæst aftur á gongdini á útlánuminnlánum, sum eru vaksin við uml. 10 prosentum. Meginparturin av hesum vøkstri stavar frá at vinnan ístaðin fyri at skylda pening nú eigur pening til góðar, sigur Jørn Astrup Hansen.

Hetta hevur samstundis eisini við sær, at útlánsváðin hjá bankanum er nógv minni enn hann var, bara fyri fáum árum síðani.

Vit fara í næstu bløðunum at gera meira við roknskapin hjá Føroya Banka.

# Nýggja læknamiðstøð gerast alt fyri eitt

*Tá tað kemur til læknahøli eru fuglfirðingar illa fyri. Tí avgjørdi býráðið at fara undir at gera nýggj hølir til kommunulæknan í bygdini beinanvegin. Ætlanin var at byggja, men tað ber ikki til og tí fer kommunan at leiga hølir til endamáli í fyrsta umfari*

SVEINUR TRÓNDARSON

Ein kommuna, sum Fuglafjørður, skal hava læknahølir, sum søma seg, tí verður farið undir at gera nýggj læknahølir í bygdini alt fyri eitt.

Hetta var niðurstøðan av býráðsfundinum í Fuglafirði týskvøldið.

Verandi læknahøli eru frá 1946 og eru í so ringum standi at tey mugu skiftast beinanvegin.

### Mugu leiga

Tá býráðið í Fuglafirði gjørdi íløguætlan fyri 2000 vóru læknahølini við í ætlanini, men tey máttu víkja fyri íløguloftinum.

Kortini varð ætlanin ikki slept, tí ístaðin er umleggingin løgd sum ein rakstrarútreiðsla, sum kemur at kosta kommununi uml. 1,5 mió. krónur.

Andstøðan fanst at, at tað ikki var roynt at fáa landsstýrið at góðtaka eina bygging og harvið at fara upp ígjøgnum íløguloftið, men tað vildi samgongan ikki hoyra talan um.

Hon vil hava hølini beinanvegin, tí eftir hennara tykki kunnu fuglfirðingar ikki bíða eftir nýggjum læknahølum.

Kommunan ger ein leigusáttmála við Føroya Banka um at leiga miðhæddina í teirra bygningi og fara í holt við umvælingararbeiði so skjótt sum tilber.

Hetta er mett at kosta uml. eina millión og sjálvur leigusáttmálin, sum er gjørdur fyri tíggju ár kostar kommununi knappar 50 túsund krónur um árið.


HEIMA BIO



Runaway Bride



Sex Games

VIDEOTOP 10

VIKA 9

1 EDtv
2 The Faculty
3 Wild Wild West
4 Når godtfolk kommer til byen
5 Familie Terapi
6 Arlington Road
7 Forces of Nature
8 Inferno
9 Kærlighed ved første hik
10 Runaway Bride

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálafirði | tel. 44 12 00 |

STATOIL

støðirnar kring landið

petur & petur 320870